

*Pláss verður fyri 62 bilum á nýggja, grøna, parkeringsøkinum við J. Paturssonargøtu*

*Mynd: Jens Kristian vang*

# Fyrsta »grøna parkeringsøkið« latið upp

**Nú eru 62 nýggj parkeringspláss til nógvu bilarnar í miðbýnum í Havn**

PARKERING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað var sannur hátíðardámur, tá Tórshavnar kommuna kl 13 seinnapartin týsdagin alment tók í nýtslu nýggja parkeringsøkið við J. Paturssonargøtu í Havn.

Jógvan Arge, varaborgarstjóri helt røðu, har hann m. a. røddi um, hvørji krøv nýggja tíðin við bilum setur einum býarstýri. Hann nevndi eisini, at nýggja býráðið í Havn ætlar at hjúkla enn meira um miðbýin, eitt nú við at gera Dr. Jakobsensgøtu til eina veruliga handilsgøtu.

Pláss eru fyri 62 bilum á nýggjar parkeringsøkinum. Í fyrstu syftu verður ikki tíðaravmarkað parkeing á økinum, men verður hetta tikið uppaftur seinni - alt eftir, hvussu økið fer at roynast.

Tað slepst bara til økið við bili frá J. Paturssonargøtu, men gøtur verða gjørdar til Mortansstovubrekku, Brekkugøtu og helst eisini Tvørgøtu, so fólk í teimum trongu gomlu gøtunum eisini fáa gleði av nýggja økinum, sum eisini kann taka trykkið av smølu gøtunum í Rabarbukvarterinum í Havn.

Tað vóru fimm bilar úr Føroya Ellisakførum, sum vóru fyrstu bilarnir at royna nýggja økið, eftir at Heðin Mortensen, borgarstjóri hevði klipt snórin.



*Jógvan Arge, varaborgarstjóri, helt røður, og Heðin Mortensen, borgarstjóri klipti snórin, tá nýggja parkeringsøkið við J. Paturssonargøtu varð tikið í nýtslu týsdagin*

*Mynd: Jens Kristian vang*



*Boði Haraldsson, býarverkfrøðingur í Havn, Heðin Mortensen, borgarstjóri og Robert Brockie, byggimeistari, sum hevur staðið fyri arbeiðnum at gera nýggja parkeringsøkið*

*Mynd: Jens Kristian vang*



*Fyrstu bilar at royna nýggja parkeringsplássið vóru fimm ellisakfør hjá limum í Føroya Ellisakførum*

*Mynd: Jens Kristian vang*